

Sunda kommuna er nú liðug við verkætlanina, har tey við nýggjum skúla, sparkivølli, dagstovni og bygdarhúsinum hava savnað alt felagslívið mitt í bygdini

Mynd: Kristina Nybo

# Skúla og sparkivøll í Hósvík

**Boðið varð til almenna samkomu í nýbygninginum hjá Hósvíkar Skúla sunnudagin, har skúlin alment varð vígdur og tikin í nýtslu. Samstundis varð sparkivøllur tikin í brúk**

SKÚLAVÍGSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Nýggjar námsfrøðiligar avbjóðingar koma árliga og setir hetta alsamt størri krøv til fólkaskúlan. Sunda Kommuna ger tí stórar íløgur í framtíðina, soleiðs at næmingar og fólk í økinum fáa so góðar karmar sum gjørligt til at leita sær lærdóm í.

Leingi hevur verið arbeitt við at byggja nýggjan bygning til Hósvíkar Skúla, umframt at umvæla tann gamla skúlabygningin, ið varð tikin í brúk í desember 1968, tá hann loysti gamla bygdaskúlan frá 1897 av.

Sunnudagin upprann so tann stóri dagurin, tá hósvíkingar aftur fingu »nýggjan« skúla, júst 40 ár eftir at verandi skúli varð tikin í nýtslu. Tó verður sami bygningurin enn nýttur, men er umvældur og næstan sum nýggjur.

Sunda Kommuna hevur eisini gjørt ein sparkivøll í Hósvík, og hóast hann hevur staðið liðugur rættiliga leingi, hevur einki hátíðarhald verið. Sparkivøllurin, ið er av teimum, ið verða stuðlaðir av FSF, er ein liður í eini heildarætlan fyri økið mitt í bygdini. Hann var eisini alment tikin í nýtslu sunnudagin.

## Myndar felagslívið í bygdini

Hósvíkar Skúli myndar nú, saman við sparkivøllinum, dagstovninum við Stórheyggj og bygdarhúsinum í Hósvík, felagslívið í bygdini, ið er savnað saman í eitt felags øki mitt í bygdini.

Nógv av bygdarfólkunum vóru savnaði til hetta hugnaliga hátíðarhaldið, ið eisini varð ríkað við sangi frá barnakórinum í Hósvík saman við foreldrum, undir leiðslu av Annette Davidsen og við undirspæli frá Árna av Reyni, ið eisini er lærari í skúlanum.

Gjáargarður borðreiddi við leskiligum ábiti, og fleiri røður vórðu hildnar, áðrenn Jógvan Fríðriksson vígdi skúlan.

Í Hósvíkar Skúla ganga í dag 42 børn, og har starvast seks lærarar. Í skúlanum eru nú samanlagt seks stovur, tríggjar skúlastovur í nýggja bygningunum og tríggjar serstovur í gamla bygninginum, umframt stóru miðhøllina í nýggja bygninginum, ið eisini er vælegnað til undirvísing.

Tað er teknistovan A3 á Norðskála við Hans Dávid Dam, ið hevur projektera alla verkætlanina og økið kring skúlan, og tað er Arbor við Finn Christensen úr Hósvík, ið saman við undirveitarum hevur staðið fyri øllum arbeiðinum. Samlaði kostnaðurin fyri skúlan er umleið 10 milliónir krónur.



Barnakórið í Hósvík ríkaði løtuna við sangi



# Lætt at raðfesta skúlaøkið

**Heðin Zachariassen fegnaðist í røðu síni um út- og umbygda skúlan og greiddi millum annað frá, at tað var ein løtt avgerð at raðfesta skúlaøkið í Sunda Kommunu**

SKÚLAVÍGSLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í samband við hátíðarhaldið, har út- og umbygdi skúlin í Hósvík alment varð tikin í nýtslu, segði Heðin Zachariassen, ið er fráfarandi borgarstjóri í Sunda Kommunu, eisini nøkur orð.

Heðin Zachariassen fegnaðist sum vera man um teir góðu karmar, ið skúlabørnini í Hósvík nú hava fingið, bæði við út- og umbygda skúlanum og við nýggja sparkivøllinum.

Heðin Zachariassen greiddi somuleiðis frá, at hann heldur at Sunda Kommuna er ein sera spennandi kommuna, og at Sundalagið sum heild er eitt sera spennandi øki at vera í. Kommunan hevur, í mun til fleiri aðrar bygdakommunur, staðið í støðugum vøkstri.

- Tað er ein løtt avgerð at raðfesta skúlaøkið í eini kommunu, sum hevur staðið í støðugum vøkstri nógvu seinnu árini, segði Heðin Zachariassen, borgarstjóri í Sunda Kommunu.

Hans Andreas Dam Joensen úr sosialu deild hjá Sunda Kommunu greiddi frá, at tað er neyðugt at gera íløgur í framtíðina, tí nýggjar námsfrøðiligar avbjóðingar stinga seg upp javnan, og at við hesum nýggju hølunum er høgt til loftið og vítt til veggja í fleiri merkingum.

*Borgarstjórin í Sunda Kommunu, Heðin Zachariassen, metir tað vera eina lætta avgerð at raðfesta skúlaøkið í eini kommunu, sum hevur staðið í støðugum vøkstri nógvu seinnu árini*